Røða hjá Margit Stóra, landsstýriskvinnu, til Vestnordisk Råds Temakonference 2026 – Fornyet håb for unges velfærd i Vestnorden

Góðu øll,

Kæru starvsfelagar úr Vestnorden.

Takk fyri at eg var boðin við her í dag, og takk fyri høvið at greiða frá, hvussu vit í Føroyum arbeiða við vælferðini hjá ungum.

Tá talan er um trivnaðin hjá ungum, so síggja vit nógvar av teimum somu avbjóðingum í Føroyum, sum eisini eru sjónligar í okkara grannalondum:

Talið av ungum við sálarligum sárbæri er vaksandi, fleiri fáa staðfest eina diagnosu, og fleiri og fleiri ung stríðast við mistrivnaði. Hetta sæst eisini aftur á bíðilistunnum til útgreining og til ymsu tilboðini og tænasturnar vaksa.

Hetta hevur stórar avleiðingar – fyrst og fremst fyri tann unga sjálvan, men eisini fyri familjuna og fyri samfelagið sum heild.

Tá ung stríðast við mistrivnaði, ávirkar tað ikki bara teirra lívsgóðsku her og nú, men eisini fortreytirnar fyri útbúgving, arbeiðsluttøku og eitt sjálvstøðugt lív seinni. Júst tí er tað avgerandi, at vit seta inn fyrr og á ein annan hátt enn áður.

Í Føroyum hava vit tí sett okkum fyri at broyta fokus á almannaøkinum.
Vit arbeiða miðvíst við fyribyrgjandi og stundisligum átøkum, so ung fáa hjálp rættstundis – og á ein hátt, sum er lættari atkomuligur og minni stirvin.

Eitt týðandi stig í hesi umlegging er verkætlanin hjá Almannaverkinum, sum eitur “Eitt gott lív á egnum beinum.”

Grundtankin er einfaldur, men týdningarmikil:
At veita rættan stuðul, í røttum tíma, so fleiri ung og familjur klára seg sjálvi longri – og harvið minka um tørvin á meira umfatandi tænastum, um tað kann fyribyrgjast.

Við *Eitt gott lív á egnum beinum* hava vit flutt fokus:

- frá diagnosum til tørv,
- frá bíðilistum til skjótari og lættari atgongd,
- og frá eini stirvnari og fløktari skipan til eina meira mennandi, fyribyrgjandi og endurmennandi tilgongd.

Hetta merkir millum annað, at vit arbeiða við:

- lággáttartænastum til ung og familjur,
- betri samanhangi millum tænastur,

- og sterkari tvørfakligum og tvørgeiraligum samstarvi – bæði innan Almannaverkið og saman við øðrum myndugleikum.

Serliga fyri børn og ung er hetta arbeiðið av stórum týdningi. Tí tað er júst her, at fyribyrgingin og møguleikin fyri menning og framgongd er størstur.

Verkætlanin fór so smátt av bakkastokki í 2024, og arbeiðið er framvegis í gongd. Út frá teimum stigum, sum longu eru tikin – og teimum átøkum, sum eru sett í verk – síggja vit tekin um, at hetta er ein gongd leið at fara, tá málið er at geva ungum skjótari og meira samanhangandi hjálp.

Í vesturnorðurlendskum høpi eru okkara átøk væl í tráð við tað, sum eisini hendir í grannalondunum, har vit síggja ein greiðan vilja til betri samspæl millum øki og skipanir, meira fyribyrgjandi arbeiði og fokus á sjálvbjargni og lívsgóðsku.

Vit hava ikki allar loysnirnar. Men vit hava eina greiða kós:
at skapa karmar, har ung kunnu fáa stuðul rættstundis – og fáa møguleikan at byggja eitt gott lív á egnum beinum.

Eg síggi fram til at læra av tykkum í Vestnorden og til framhaldandi samstarv, so vit saman kunnu geva ungum nýggja vón og eitt sterkari grundarlag fyri framtíðina.

Takk fyri.